# VIÐAREIÐI

Fólkatal: 354 (2017). Viðareiðis kommuna. / *Population: 354 (2017). Municipality of Viðareiði.*








Her ert tú
*You are here*

WC
*Toilet*

Hjartastartari
*Defibrillator*

Frítíðarøki
*The recreation area*

Útsýnisstað
*Viewpoint*

Gongutúrur
*Hike*

Matstovan hjá Elisabeth – føroyskir serrættir
*Matstovan hjá Elisabeth – A restaurant that serves Faroese specialities*

Hotel Norð. Opið eftir avtalu, sí: www.hotelnord.fo
*Hotel Norð. Open upon request, check www.hotelnord.fo*

Neyð og hjálp
*Emergency call*
**112**

**Visit Norðoy**

Tel. + 298 456939

Skanna hesa kotu, og kunna teg nærri um ferðamøguleikar í Norðoyggjum.

*Scan this code, and get more information about travelling in the Northern Islands.*

## VER EIN HJÁLPIRÓT

- Lat einki órudd liggja eftir tær – rudda heldur upp.
- Stuðla bygdunum – keyp staðbundnar vørur.

## BE A HELPING ROOT

*Hjálpirót is the Faroese word for rose root (Rhodiola rosea), a flourishing plant traditionally used for medicine. Hjálpirót means „helping root", and you can be one by following these simple steps.*

- *Please do not litter – but feel free to pick up litter on your way.*
- *Support the local community – buy local goods.*

*

## TÁ IÐ TÚ FERT TIL FJALS

- Best er at hava staðkendan ferðaleiðara við á túrum í fjøllunum - nærri kunning fæst á Norðoya Kunningarstovu.
- Boða onkrum frá, um tú fert til fjals uttan ferðaleiðara.
- Fylg rásum og varðum, og minst til at lata hagaportrini aftur eftir tær.
- Gev seyði, fugli og gróðuri frið.

## HIKING ADVICE

- *We recommend that you bring a local guide with you on mountain hikes in the Northern Islands. Please contact Visit Norðoy for further information about guided hiking trips.*
- *If you do go on your own, please let your host know where you are going.*
- *Follow the paths and cairns, and close the outfield gates behind you.*
- *Avoid disturbing sheep, birds and plants.*

Nærri kunning um trygd á fjalltúrum fæst við at skanna hesa kotu.

*For more information about safe hiking in the Faroe Islands, please scan this code.*

## FO

Fuglabjørgini fyri norðan, ríka lendið í dalinum og góðu møguleikarnir at rógva út á fiskimiðini hava gjørt sítt til, at Viðareiði søguliga hevur verið høvuðsstaður í Norðoyggjum.

Viðareiði er fyrstu ferð nevnd í Hundabrævinum (1350-1400). Greitt er tó, at búsetingar hava verið longur, enn fyrstu skrivligu keldurnar vísa á. Fram til 1934 vóru allar Norðoyggjar eitt prestagjald, og høvuðssætið var á Viðareiði. Villingardalsfjall (844 m) (1), ið er triðhægsta fjall í Føroyum, stendur sum ein borg norðan fyri bygdina, og sunnanfyri trónar Malinsfjall (751 m) (2) upp ímóti hæddunum. Tað hevur kravt dirvi og hegni av viðoyingum at fáa náttúrutilfeingið til vega, og prísurin hevur mangan verið høgur. Í 2017 læt upp minnislund yvir tey, ið eru dottin oman í bjørgunum, sjólátin, ella á annan hátt hava mist lívið úti í náttúruni (3). Sermerktu grótgarðarnir á Viðareiði (4), ið eru fleiri metrar høgir, girða teigarnar inni, sum einaferð myndaðu lívið á Viðareiði. Alt grótið er tikið úr lendinum við handamakt, tá ið viðoyingar veltu hagan til bø.

### Viðareiðis kirkja

Kirkjan (5), sum stendur í dag, varð vígd í 1892, men aðrar kirkjur hava staðið frammanundan. Kirkjan er laðað úr gróti, ið er tikið undir Bakkanum (6). Monnum í sóknini varð álagt at bera grótið upp á pláss, og tað vórðu 24 steinar upp á mannin um árið í tvey ár. Á norðurvegginum í kirkjuni hongur ein krossmynd, ið telist millum elstu kirkjugripir í Føroyum. Thomas Koppen úr Hamburg, sum fekk einkarætt til handilin upp á Føroyar í 1533, gav kirkjuni krossmyndina í gávu. Bretska herflotastjórnarráðið læt viðoyingum kirkjusilvurið í takkargávu, eftir at bygdarfólkið kom monnum av briggini Marwood til hjálpar í 1847. Set teg í samband við Norðoya kunningarstovu, um tú hevur hug at vitja kirkjuna.

### Guttormur í Múla

Guttormur í Múla (1657-1737), ið var gitin gandakallur, liggur grivin í gamla kirkjugarði (7), og navn hansara stendur á eini plátu við kirkjugarðin. Søgnin sigur, at hann fekk megi sína úr gomlum gandabókum, sum prestur blakaði í havið, og sum hann fann rekandi uttan fyri helluna.

### Prestagarðurin í Ónagerði

Prestagarðurin í Ónagerði (8) varð bygdur í 1853-64 og var eitt skifti heimstaður hjá Bente Christine Broberg, ið er søguliga kvinnan undir skaldsøguni Barbaru eftir Jørgen-Frantz Jacobsen rithøvund. Filmur um Barbaru, ið Nils Malmros leikstjórnaði, kom út í 1997. Tað sigst, at Beinta gongur aftur í prestagarðinum í Ónagerði.

### Christian Matras

Viðareiði fostraði Christian Matras (1900-1988), ið er ein av Føroya mætastu yrkjarum. Hann var føddur her (9). Sum tólv ára gamal flutti Christian Matras til Havnar at ganga í skúla, men íblásturin til skaldskapin heintaði hann úr barnaminnunum av Viðareiði. Tað kemur eitt nú fram í yrkingini „Fólk í huganum":

Tað ganga fólk í huganum á mær,
tað bygdarfólkið, sum á sinni var,
øll tey eg sá og hoyrdi, frætti frá,
alt fólk, sum ikki meir er omaná.

Á eystaru síðu á skúlanum á Viðareiði (10), ið var vígdur í 1986, hongur eitt verk eftir Fridtjof Joensen (1920-1988) myndahøggara, sum ímyndar versini í hesari yrking.

## EN

*The bird cliffs to the north, the lush, green terrain in the valley, and the excellent opportunities for rowing out to the fishing grounds, have all played their part in making Viðareiði the historical capital of the Northern Islands.*

*Viðareiði was first mentioned in „Hundabrævið", which is a letter about dog keeping dated around 1350-1400. Yet it is clear that there have been settlements here for much longer. Until 1934, all the Northern Islands were one parish and its headquarters were in Viðareiði. The third highest mountain in the Faroe Islands, Villingardalsfjall (844 m) (1), towers over the village to the north and to the south Malinsfjall (751 m) (2) soars into the sky. In this landscape, it took great courage and skill to acquire the necessary natural resources, and the price paid was often high. In 2017, a memorial grove was planted to commemorate those who fell from the cliffs, were lost at sea, and others who lost their lives in the harsh Faroese nature (3). The special stone fences in Viðareiði (4), several metres high and wide, separate the fields that once defined life in Viðareiði. Every single stone was carried by hand from the surrounding landscape when the people of Viðareiði tilled the fields.*

### The Church of Viðareiði

*The present-day church (5) was consecrated in 1892, but there have been previous churches on the same location. The church is made of stones taken from the coastline (6). The men of the parish were required to carry stones to the site of the church. Each man carried 24 stones a year for two years. On the northern wall of the church hangs an altar plate, one of the oldest church treasures in the Faroe Islands. Thomas Koppen from Hamburg, who obtained the monopoly on Faroese trade in 1533, donated the altar plate to the church. The British Royal Navy donated the church silver to the people of Viðareiði in acknowledgment of the village's help in rescuing and caring for the crew of the shipwrecked brig, Marwood, in 1847. Contact Visit Norðoy if you want to take a look inside the church.*

### Guttormur í Múla

*Guttormur í Múla (1657-1737), who was a renowned sorcerer, lies buried in the old churchyard (7), and his name appears on a plate in the churchyard. According to legend, he got his powers from old spell books. The priest had thrown the books into the sea, and Guttormur found them floating by the shore.*

### The Vicarage in Ónagerð

*The vicarage in Ónagerð (8) was built in 1853-64, and was for a time home to Bente Christine Broberg, the historical woman that the main character in the novel „Barbara" is based on. Jørgen-Frantz Jacobsen wrote the book. A film about „Barbara", directed by Niels Malmros, was released in 1997. They say that Beinta haunts the vicarage in Ónagerði.*

### Christian Matras

*Christian Matras (1900-1988), one of the greatest Faroese poets, was a product of Viðareiði. He was born here (9). At twelve years old, Christian Matras moved to Tórshavn to attend school, but the inspiration for his writing of poetry was found in his childhood memories from Viðareiði. This is apparent in the poem „Fólk í huganum":*

*Tað ganga fólk í huganum á mær,*
*Tað bygdarfólkið, sum á sinni var,*
*Øll tey eg sá og hoyrdi, frætti frá.*
*Alt fólk, sum ikki meir er omaná.*

*People traverse my thoughts,*
*The villagers that once were.*
*All those I heard and saw, heard from,*
*All people no longer above ground.*

*On the eastern side of the school in Viðareiði (10), inaugurated in 1986, hangs a piece of art by sculptor Fridtjof Joensen (1920-1988), that depicts this poem.*

## VIT VIÐMÆLA

### Útsýnisstøð

Uppi á Váli (11), har tú um summarið kanst uppliva viðgitna sólsetrið og útsýnið yvir Kunoy og Borðoy. Uppi við Garð (12), har útsýnið er yvir allar seks Norðoyggjar. Hygg vestureftir, og tú sært Múlan á Borðoynni og Kunoy og Kalsoy. Snara tær eystureftir, so sært tú Fugloy og Svínoy.

### Villingardalsfjall

Gongutúrurin niðan á Villingardalsfjall. Túrurin byrjar uppi við Garð (12), og er á leið 6 km langur, og tekur 3-4 tímar. Nærri kunning um túrin fæst við at taka niður „Hiking in the Faroe Islands".

### SERLIG ATLIT

Viðareiði er liðið til forbergið Enniberg. Viðoyingar mæla staðiliga ferðafólki frá at ganga túrin til Ennibergs uttan ferðaleiðara, tí hann kann vera vandamikil. Lendið er bratt, leiðin torfør, og mjørki kann brádliga koma á.

## LOCAL'S CHOICE

### Viewpoints

*Uppi á Váli (11), where you can experience the famous sunset and view of Kunoy and Boroyð the entire summer. Uppi við Garð (12), offers a view of all six of the Northern Islands. Look to the west and you will see Múli on Borðoy, Kunoy and Kalsoy. Turn to the east and you will see Fugloy and Svínoy.*

### Villingardalsfjall

*Take the beautiful hike to Villingardalsfjall. The hike begins at Uppi í Garð) (12), takes 3-4 hours, and the distance is about 6 km. For further information about this hike, please download „Hiking in the Faroe Islands".*

### BE AWARE

*Viðareiði is the link to the sea cliff Enniberg. The people from Viðareiði discourage tourists from going on this hike without a guide, because it can be dangerous. The landscape is very steep, the path is difficult and the fog can appear very suddenly.*